

# Ársfrágreiðing 2025

Blákrossheimið

Hagtøl

# Um hagtøl

Nakrar styttingar verða brúktar í samband við hagtølini hjá Blákrossheiminum. Hesar sipa serliga til ambulantu viðgerðartilboðini, sum Blákrossheimið bjóðar.

Blákrossheimið bjóðar fylgjandi viðgerðartilboð.

**Døgnviðgerð**

Døgnviðgerðin er "siðbundna" viðgerðin, har búfólk búgva á Blákrossheiminum í fleiri vikur. Døgnviðgerðin er eyðkend av bólkaterapi og førleikaundirvísing, umframt einstaklingasamtalum.

**Ambulant viðgerð**

*DAT Ung*

DAT Ung er ambulanta ungdómsviðgerðin hjá Blákrossheiminum. Hon er ætlað ungum frá 15 til 25 ár.

*Fam DAT*

"Familju DAT" er ambulanta viðgerðartilboðið til avvarðandi. Í løtuni møtast tveir bólkar eina ferð um vikuna, annar í Havn og hin á Nesi, har undirvíst og eftirmett verður í DAT førleikum.

*RNÓ DAT*

RNÓ er stytting fyri "rúsnýtsluórógv". Tveir RNÓ bólkar møtast eina ferð um vikuna, í Havn og á Nesi, til undirvísing og eftirmeting í DAT førleikum.

*Kvinnu DAT*

Hetta er ambulanti DAT bólkurin, sum burturav er ætlaður til kvinnur. Hesar kvinnur savnast eina ferð um vikuna í Havn til undirvísing og eftirmeting.

*Nágreiniligar talvur eru at finna við øllum hagtølunum eftir stuttorðaðu og grafisku samanumtøkuna, sum er at finna niðanfyri.*

## **Hagtøl**
## Persónar í viðgerð

Í 2025 fingu 165 persónar viðgerð frá Blákrossheiminum. Samstundis vóru 237 viðgerðir. Hetta merkir, at tað vóru persónar, sum fingu fleiri enn eina viðgerð. Hvussu nógvar, sæst niðanfyri.

Orðið "viðgerð" umfatar her bæði døgnviðgerð, tvs. uppihald á Blákrossheiminum (fullfíggjað ella ófullfíggjað), og ambulanta viðgerð, tvs. luttøku í einum av okkara ambulantum DAT bólkum. Hvørt modul, undirvíst verður í, í ambulantu bólkunum telur sum ein viðgerð.






## Kynsbýti

Eins og undanfarin ár fáa fleiri menn enn kvinnur viðgerð frá Blákrossheiminum - umleið tveir triðingar, menn (65%), og umleið ein triðingur, kvinnur (35%).




## Aldursbýti

Í 2025 var miðalaldurin á teimum, sum leitaðu sær viðgerð frá Blákrossheiminum 36 ár.

Verður einans hugt eftir teimum, sum komu í døgnviðgerð á Blákrossheiminum, so var miðalaldurin 42 ár.



Miðalaldurin í DAT Ung var 21 ár.




## Rúsnýtsla

Fyri at fáa greiði á, hvørji rúsandi evni, ið tey, sum leitaðu sær viðgerð frá Blákrossheiminum nýttu, verða tey koyrd í fýra flokkar:

1. Alkohol
2. Alkohol og tablettir
3. Alkohol, tablettir og hash
4. Alkohol, tablettir, hash og narko




## Onnur tøl

- Tal av viðgerðum: 237
- Tal av døgnviðgerðum: 60
- Tal av ambulantum viðgerðum: 177
- Nýggir persónar í viðgerð fyri rúsnýtsluórogv: 68
- Røktardagar í alt, døgnviðgerð: 2033
- Røktardagar í miðal pr. fólk, døgnviðgerð: 34
- Miðal búfólk pr. dag: 6

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tal av viðgerðum tilsamans** | 172 | 254 | 301 | 308 | 300 | 237 |
| **Tal av døgnviðgerðum** | 82 | 101 | 95 | 96 | 100 | 60 |
| **Tal av ambulantum viðgerðum** | 127 | 153 | 206 | 212 | 200 | 177 |
| **Nýggj persónar í viðgerð fyri rúsnýtsluórógv** | 49 | 42 | 74 | 78 | 58 | 68 |
| **Røktardagar í alt, døgnviðgerð** | 1795 | 3319 | 3046 | 2882 | 2400 | 2033 |
| **Miðal búfólk hvønn dag, døgnviðgerð** | 5 | 9 | 8 | 8 | 7 | 6 |

## MapPlan

Síðani 2023 hevur Blákrossheimið, í samstarv við Århus Universitet, nýtt eina hagtalsskipan, ið kallast MapPlan. Hetta er eitt amboð, ið verður nýtt av flestu viðgerðarstovnum í Danmark, og gevur tað eina heildarfatan av avbjóðingunum, ið hvør einstakur, sum søkir sær hjálp fyri sítt rúsnýtsluórógv, hevur. Úrslitið av spurnarblaðnum verða so brúkt til at menna viðgerðarætlanina hjá tí einstaka.

Hagtølini niðanfyri eru frá MapPlan. Tilsamans svaraðu 62 persónar MapPlan spurnarblaðnum. Hesir vóru knýttir at døgnviðgerðini og DAT Ung. Blákrossheimið hevur ikki nýtt MapPlan til hinar ambulantu bólkarnar. Hagtølini verða flokkað í fýra bólkar: Vaksin alkohol, Vaksin rúsevni, Ung alkohol og Ung rúsevni.

## Royking

Av teimum 62 persónunum, sum vórðu spurdir, svaraðu 38, at teir roykt u. 24 svaraðu nei. Tað svarar til ávíkavist 61% og 39%.



## Psykiatriskar diagnosur

Líka undir helvtina av okkara klientum í 2025 høvdu fingið staðfest eina diagnosu av sálarlækna, áðrenn tey komu í viðgerð. 40% høvdu ADHD, 25% tunglyndi og 15% angist. Blákrossheimið setur ikki psykiatriskar diagnosur, men í summum førum hava vit samstarva við Psykiatrisku deild, har fleiri hava fingið eina diagnosu, meðan ella eftir tey hava verið í viðgerð hjá okkum.

## Psykiatriskur heilivágur

44% av okkara klientum í 2025 tóku heilivág fyri sálarligar avbjóðingar.




## Samband við psykiatri

Ein góður triðjingur hevði virkið samband við psykiatriina, tá ið tey svaraðu spurnarblaðnum.



## Impulsivitetur

Spurningarnir um impulisivitet snúgva seg um, at meta um hesar útsagnirnar: “Eg handli impulsivt,” “Eg tosi fyrst og hugsi seinni,” “Eg keði meg, um eg skal gera tað sama aftur og aftur” og “Eg geri ting, uttan at hugsa meg um”.

Eitt, sum eyðkennir ADHD er impulsivitetur. 40% av spurdu høvdu ADHD diagnosu, tá ið tey komu í viðgerð. Samstundis mettu 45% av spurdu seg hava antin høgan ella sera høgan impulsivitet.

## Mistrivnaður

46% av teimum spurdu høvdu høgan til sera høgan mistrivnað. Mistrivnaður umfatar spurningar um tunglyndi, angist og einsemi.

## Trauma

Næstan 80% av teimum spurdu høvdu upplivað hendingar, sum strongdu tey sera nógv. Hesar hendingar kunnu kallast traumatiskar.Hetta kann sipa til rúsmisnýtslu í familjuni, happing, harðskap, sálarligan ágang, kynsliga misnýtslu og annað líknandi. Av teimum, sum svaraðu ja, svaraðu næstan 50%, at tey framvegis vóru antin “Nógv” ella “Sera nógv” ávirkað av hesum hendingum.

Júst hesi hagtøl eru frá 2024 til mai 2026.

## Sjálvmorðstankar

Í 2025 høvdu 29% okkara klientum nakað av sjálvmorðstankum, meðan 10% stríddust nógv við sjálvmorðstankar.

## Sjálvskaði

18% høvdu høga til sera høga sjálvskaðandi atferð. Sjálvskaði umfatar spurningar um við vilja likamliga at skaða seg sjálvan, eitt nú við at skera, brenna, gera sár á annan hátt, royta hár osfr.

## Gerandisdagur

46% høvdu ein óskipaðan ella sera óskipaðan gerandisdag. Gerandisdagur umfatar her spurningar um svøvn, konditión, matvanar, at leggja ætlanir, at halda avtalur og at rudda.

## Inntøka

52% vunnu sær flest pening ígjøgnum egið starv, meðan 48% fingu mest pengar tann síðsta mánaðan á annan hátt.

## Bústaðarviðurskifti

Nógv tey flestu - líka omanfyri 89% - av spurdu høvdu støðug bústaðarviðurskifti.

## Børn

Av teimum, sum komu í viðgerð í 2025 áttu 63% børn.

# Talvur

Viðgerðir og persónar

| | Døgn-viðgerð | DAT ung | Fam DAT | RNÓ DAT | Kvinnu DAT |
|---|---|---|---|---|---|
| **Persónar** | 58 | 20 | 19 | 68 | 15 |
| **Viðgerðir** | 60 | 24 | 40 | 113 | 31 |

Viðgerðartíttleiki

| | Døgn-viðgerð | DAT ung | Fam DAT | RNÓ DAT | Kvinnu DAT |
|---|---|---|---|---|---|
| **1 ferð** | 58 | 16 | 6 | 42 | 6 |
| **2 ferðir** | 2 | 4 | 7 | 15 | 6 |
| **3 ferðir** | 0 | 0 | 4 | 5 | 1 |
| **4 ferðir** | 0 | 0 | 2 | 4 | 0 |
| **5 ferðir** | 0 | 0 | 0 | 2 | 2 |

Kynsbýti

| | Øll til-samans | Døgn-viðgerð | Ambu-lant | DAT ung | Fam DAT | RNÓ DAT |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Menn** | 96 | 49 | 92 | 10 | 3 | 49 |
| **Kvinnur** | 51 | 11 | 85 | 10 | 16 | 19 |
| **Til-samans** | 147 | 60 | 177 | 20 | 19 | 68 |
| **Menn** | 65.3% | 81.7% | 52.0% | 50.0% | 15.8% | 72.1% |
| **Kvinnur** | 34.7% | 18.3% | 48.0% | 50.0% | 84.2% | 27.9% |

Aldursbýti

| | Døgnviðgerð | Fam DAT | RNÓ DAT | Kvinnu DAT |
|---|---|---|---|---|
| **18-25 ár** | 8 | 1 | 2 | 1 |
| **26-39 ár** | 20 | 5 | 12 | 4 |
| **40-49 ár** | 14 | 6 | 17 | 4 |
| **50-59 ár** | 9 | 5 | 18 | 1 |
| **60+ ár** | 7 | 2 | 19 | 5 |

Aldursbýti, DAT Ung

| | DAT Ung |
|---|---|
| **14 ár** | 1 |
| **15-17 ár** | 1 |
| **18-25 ár** | 18 |
| **26+ ár** | 1 |

Rúsnýtsla

| | Alkohol | Alkohol, tabl | Alk, tabl, hash | Alk, tabl, hash, narko |
|---|---|---|---|---|
| **Døgnviðgerð** | 34 | 3 | 14 | 7 |
| **DAT Ung** | 5 | 0 | 11 | 5 |

**MapPlan**

Vaksin (alkohol): 39 persónar

Vaksin (rúsevni): 13 persónar

Ung (alkohol): 2 persónar

Ung (rúsevni): 8 persónar

Av tí, at bert tveir ungir persónar eru í flokkingini fyri alkohol, eru báðar ungu flokkingarnar taldar saman.

Royking

| | Vaksin (alkohol) | Vaksin (rúsevni) | Ung | Prosent |
|---|---|---|---|---|
| **Ja** | 20 | 10 | 8 | 61,3% |
| **Nei** | 19 | 3 | 2 | 38,7% |

Psykiatriskar diagnosur

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Tunglyndi | 6 | 7 | 3 | 16 | 25,8% |
| Bipolar | 2 | 0 | 0 | 2 | 3,2% |
| Angist | 2 | 4 | 3 | 9 | 14,5% |
| PTSD | 1 | 1 | 0 | 2 | 3,3% |
| ADHD | 8 | 12 | 5 | 25 | 40,3% |
| Persóns-leikaórógv | 0 | 1 | 1 | 2 | 3,2% |
| OCD | 0 | 1 | 1 | 2 | 3,2% |
| Autisma/ Asperger | 1 | 0 | 1 | 2 | 3,3% |
| Skizofreni | 0 | 1 | 0 | 1 | 1,6% |
| Psykosa | 0 | 1 | 0 | 1 | 1,6% |
| Annað | 1 | 0 | 0 | 1 | 1,6% |
| Onga diagnosu | 28 | 1 | 5 | 34 | 54,8% |
| Ynskir ikki at upplýsa | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% |

Psykiatriskur heilivágur

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 15 | 7 | 5 | 27 | 43,5% |
| Nei | 24 | 6 | 5 | 35 | 56,5% |

Samband við psykiatri

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 9 | 8 | 4 | 21 | 33,9% |
| Nei | 30 | 5 | 6 | 41 | 66,1% |

Impulsivitetur

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lágan mun | 12 | 1 | 3 | 16 | 25,8% |
| Miðal mun | 13 | 2 | 3 | 18 | 29,0% |
| Høgan mun | 10 | 7 | 3 | 20 | 32,3% |
| Sera høgan mun | 4 | 3 | 1 | 8 | 12,9% |

Mistrivnaður

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lágan mun | 6 | 1 | 1 | 8 | 13,1% |
| Miðal mun | 18 | 3 | 4 | 25 | 41,0% |
| Høgan mun | 7 | 3 | 2 | 12 | 19,7% |
| Sera høgan mun | 8 | 5 | 3 | 16 | 26,2% |

Trauma

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 82 | 21 | 24 | 127 | 78,2% |
| Nei | 27 | 2 | 4 | 33 | 20,4% |
| Ynski ikki at svara | 0 | 2 | 0 | 2 | 1,2% |

Hvussu nógv ávirkar trauma?

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lítið | 28 | 4 | 3 | 35 | 27,6% |
| Eitt sindur | 17 | 5 | 7 | 29 | 22,8% |
| Nógv | 22 | 4 | 10 | 36 | 28,3% |
| Sera nógv | 15 | 8 | 4 | 27 | 21,3% |

Sjálvmorðstankar

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Als ikki | 24 | 8 | 6 | 38 | 61,3% |
| Eitt sindur/ Lítið | 11 | 3 | 4 | 18 | 29,0% |
| Nógv/ Sera nógv | 4 | 2 | 0 | 6 | 9,7% |

Sjálvskaði

| | **Vaksin (alkohol)** | **Vaksin (rúsevni)** | **Ung** | **Samlað** | **Prosent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Lágan mun | 22 | 7 | 3 | 32 | 51,6% |
| Miðal mun | 13 | 2 | 4 | 19 | 30,6% |
| Høgan mun | 1 | 3 | 2 | 6 | 9,7% |
| Sera høgan mun | 3 | 1 | 1 | 5 | 8,1% |

## Gerandisdagur

| | Vaksin (alkohol) | Vaksin (rúsevni) | Samlað | Prosent |
|---|---|---|---|---|
| Sera skipaður | 7 | 2 | 9 | 17,3% |
| Skipaður | 13 | 6 | 19 | 36,5% |
| Óskipaður | 15 | 2 | 17 | 32,7% |
| Sera óskipaður | 4 | 3 | 7 | 13,5% |

## Inntøka

| | Vaksin (alkohol) | Vaksin (rúsevni) | Ung | Samlað | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiði | 25 | 4 | 3 | 32 | 51,6% |
| Lestrar-stuðul | 1 | 0 | 0 | 1 | 1,6% |
| Dagpengar | 5 | 4 | 3 | 12 | 19,4% |
| Onnur almenn hjálp | 5 | 1 | 0 | 6 | 9,7% |
| Pension | 1 | 2 | 0 | 3 | 4,8% |
| Onga inntøku/ stuðul | 1 | 0 | 2 | 3 | 4,8% |
| Annað | 1 | 2 | 2 | 5 | 8,1% |

## Bústaðarviðurskifti

| | Vaksin (alkohol) | Vaksin (rúsevni) | Ung | Samlað | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|
| Støðugt | 36 | 11 | 8 | 55 | 88,7% |
| Óstøðugt/ ikki bústað | 3 | 2 | 2 | 7 | 11,3% |
| Institutión/ fongsul | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% |

## Børn

| | Vaksin (alkohol) | Vaksin (rúsevni) | Ung | Samlað | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 26 | 10 | 3 | 39 | 62,9% |
| Nei | 13 | 3 | 7 | 23 | 37,1% |